## Kvinnunevndin hjá FSF mannað

Hanna Olsen í Syðrugøta, Sunnuva Vesturdal á Eiði og Ingun Hansen á Skála eru nýggir limir í kvinnunevndini hjá Fótbóltssambandinum, ið hevur ábyrgd av steypa- og landskappingini hjá kvinnum og gentum. Tær tríggjar eru valdar í nevndina, sum frammanundan telur starvsnevndarlimirnar Karl Vidtfeldt, sum er formaður, og Magnus á Stongum. Starvsnevndini hjáa Fótbóltssambandinum vónar, at tær tríggjar kvinnurnar kunnu vera drívmegin í nevndini og fáa sína ávirkan á, hvussu kvinnufótbólturin verður skipaður í framtíðini.



## Skiftir VÍF út við Stjørnuna

Hóast formaðurin í Stjørnuni herfyri segði, at felagið ikki ætlaði at kunngera avloysaran fyri Henrik Gerster sum venjara fyri besta kvinnuliðnum hjá Stjørnuni, fyrr enn kappingin var liðug, hevur nýggi venjarin nú sjálvur avdúkað seg. Morten Hust Petersen, sum venur menninar hjá VÍF, hevur fortalt Kringvarpinum, at hann næstu tvey árini skal venja Stjørnuna. Hann vil royna okkurt nýtt, og heldur tað eisini vera gott, at VÍF kann fáa nýggjan íblástur.

# Sveisiski spælistílurin hóskar tí føroyska væl

**– Hóast sveisararnir kanska kunnu vera eksplosivir, so koyra teir ikki so øgiliga skjótt fram eftir vøllinum og eru ikki so øgiliga skjótir heim, sum fleiri av hinum liðunum, vit longu hava spælt ímóti, sigur annar av landsliðsvenjarunum, Dia Midjord**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Dia Midjord, landsliðsvenjari, heldur um sveisiska spælistílin, at hann hóskar væl tí føroyska*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tríggir av teimum fyrstu fýra dystunum hjá manslandsliðnum í EM-undankappingini, sum vóru spældir í heyst, endaðu við stórtapi. Ímóti Serbia heima og Russlandi úti taptu Føroyar við 21 málum, og millum teir báðar dystirnar taptu Føroyar á útivølli fyri Bosnia við 17 málum. Frægast gekst í síðsta dystinum ímóti Italia, har munurin »bara« var sjey mál.

Felags fyri Serbia, Russland og Bosnia var, at tey mestsum trumlaðu føroyska liðið niður, sum úrslitini eisini siga, meðan Italia ikki rættiliga hevði sama skjótleikan og somu styrkina, sum hini. Nú fimta liðið í bólkinum, Sveis, vitjar í Føroyum, er spurningurin, hvussu tað fer at ganga.

– Hesir spælararnir, í mun til hini liðini, vit hava spælt ímóti, eru ikki so øgiliga stórir og spæla ikki so øgiliga skjótan hondbólt. Eg vil siga, at teir kanska spæla eitt slag av hondbólti, ið hóskar eitt sindur betri til okkara spæl, sigur Dia Midjord, sum saman við Kára Nielsen er venjari hjá landsliðnum.

– Teir eru kanska eksplosivir, men koyra ikki so øgiliga skjótt fram eftir vøllinum og eru ikki so øgiliga skjótir heim, sum fleiri av hinum liðunum. Teir eru nokk so tungir á sær, men øgiliga sterkir, og eftir mínum tykki spæla teir eitt slag av hondbóltsspæli, ið hóskar okkum væl, tí okkara spælarar eru eisini nokk so kropsliga sterkir.

### Heimligir spælarar

Um hugt verður at úrslitunum hjá Sveis higartil í hesi EM-undankappingini, hava úrslitini í trimum av teimum fýra dystum verið sera góð. Sveis vann við sjey málum á Italia, tapti við einum fyri Russlandi og spældi javnleik ímóti Serbia, áðrenn tað gjørdist eitt heilt annað úrslit ímóti Bosnia, sum vann við 11 málum.

Teir báðir landsliðsvenjararnir hava í sínum fyrireikingum hugt at, hvussu sveisiska liðið er mannað, og líkt er til, at talan er um fleiri royndar spælarar, men at teir flestu í dag eru at finna í heimligu kappingini í Sveis.

– Vit kunnu staðfesta, at Sveis hevur onkrar fínar frontfigurar á liðnum. Millum annað hava teir ein spælskipara, sum nú spælir í Sveis, men frá næsta kappingarári spælir við Bjerringbro í Danmark. Og so hava teir ein høgrabakk, sum millum annað hevur spælt í Spania, umframt at onkrir hava verið í Týsklandi eisini, sigur Dia Midjord.

– Men teir flestu hjá teimum spæla heima í Sveis og kanska einir tveir í øðrum londum. So teir eru kanska í somu støðu sum vit, tá tað kemur til útisetar, tí vit hava jú teir allarflestu av okkara spælarum í Føroyum og so bara ein ella tveir í Danmark.

## Føroyski hópurin

**Teir 14 spælararnir, 12 útispælarar og tveir málverjar, sum eru tiknir út til EM-undankappingardystin ímóti Sveis í ítróttarhøllini á Hálsi í kvøld klokkan 19.**

**VÍF**
Agnar Joensen
Rúni Joensen
Sámal Joensen
Áki G. Olsen

**Neistin**
Finnur Hansson
Ingi Olsen
Karl Herup Olsen

**H71**
Regin Joensen
Levi Nybo (málverji)
Esbern Patursson

**Kyndil**
Hans Áki Dal-Christiansen
Bárður Johannesen

**Ajax Keypmannahavn**
Heini Hanusarson

**ÍF Føroyar**
Lars L. Black (málverji)

# Nýggj byrjan er altíð góð

**Tað er hugaligt, tá allir partar rundan um manslandsliðið í hondbólti staðfesta, at tað farna er farið, og at nú verður byrjað av nýggjum. Og hjá øðrum er tað eisini ein nýggj byrjan, bara tú sleppur upp í part**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Rokilsið í vetur rundan um manslandsliðið í hondbólti kastaði sínar skuggar yvir hondbóltin í eina tíð – alt ov langa tíð! Tað er altíð keðiligt, tá annað enn tað ítróttarliga kemur í fokus, men líka so gleðiligt er tað, at allir partar nú eru sinnaðir at leggja alt tað farna aftur um seg. Tað hava teir á og rundan um manslandsliðið nú gjørt, so tí verður dysturin ímóti Sveis í kvøld í so máta ein nýggj byrjan.

So kunnu vit annars vóna, at »ein nýggj byrjan« eisini fer at smitta sjálvt spælið. Liðið treingir ið hvussu er til at fáa eitt sindur meira burturúr, enn í fyrstu trimum av teimum fýra dystunum higartil í EM-undankappingini. At tapa við 20 málum í miðal er sanniliga ikki stuttligt! Men nú spælararnir skuldu verið í toppformi, kunnu vit vóna, at dysturin í kvøld eisini verður ein nýggj byrjan hjá hondbóltslandsliðnum – ítróttarliga sæð.

Og nú vit tosa um nýggja byrjan, so fer Fótbóltssambandið undir at skipa fyri fótbóltskappingum fyri fólk við breki, og tað fegnast tey um í bæði ÍSB og Special Olympics. Hetta er eitt týðandi stig á leiðini, har ráðandi hugburðurin má vera, at ítróttur er fyri øll og at øll kunnu sleppa upp í part. At so størsta og sterkasta sersambandið gongur undan, er ikki annað enn náttúrligt, og tað eigur Fótbóltssambandið at fáa rós fyri.

Eisini á einum øðrum móti hava brekað og menningartarnað fingið eina nýggja byrjan, tí í farnu viku var sett á stovn nýtt ítróttarfelag fyri brekað í Eysturoynni, sum hevur vakra navnið Svanur. Tað er stuttligt at síggja, at Svanur longu á stovnandi aðalfundinum fekk luft undir veingirnar, og kanska verður hetta spírin, ið fær fleiri líknandi feløg at spretta kring landið. Men eigur ítrótturin at vera fyri øll, áttu kanska eisini verandi ítróttarfeløg innan allar ítróttargreinar at umhugsað, um tey ikki skuldu latið dyrnar víðari upp, so tey eitt nú høvdu deildir innan ÍSB við sum part av sínum virksemi. Tað hevði verið vorðið sum nýggj byrjan!